Dagføring av tøkum peningini við árslok

Um ikki fyrr, so við árslok, skal tøkur peningur á fíggjarstøðu stovnsins verða rættur. Tað vil siga, at bókhald pr ávísan dag sigur somu upphædd sum t.d. kontuavrit frá banka ella kassauppteljing.

Talan er um hesar standardroknskaparkontur:

Bankar/gjaldskortkontur: 0416, 0423 ella 0426 – tá ið uppgerð fyri bankan er bókað pr 31/12/2017, skal saldan í bókhaldinum vísa tað sama sum kontuavrit bankans pr 31/12/2017.

Kassar: 0438 – tá ið uppgerð fyri kassan er bókað pr 31/12/2017, skal saldan í bókhaldinum vísa tað sama sum kassauppteljingin pr 31/12/17.

Millumrokningar: 0643 og 0649 – hesar kontur verða brúktar til at flyta pening millum bankar og kassar við. Hesar skulu vísa 0 pr 31/12/17. Er saldan ikki 0, so "stemma" bankar og/ella kassar ikki. Rakstur er møguliga heldur ikki heilt rættur. Um kontur av slagnum 06xx er at siga, at tær eru ein "millumlending" millum tveir "kassar". Antin er peningurin í kassa 1 ella í kassa 2. Um salda er á kontum 06xx, so sigur stovnurin "peningurin er hvørki í kassa 1 ella kassa 2".

Meira nágreinað kann sigast um ymsu konturnar, sum verða brúktar til tøkan pening:

Konta 0426: soleiðis eitur "banki" í "Kontuskipan landsins". Útgreining av kontu 0426 sigur okkum, hvør spesifikkur banki, ið talan er um. T.d. merkir 0426-0020: konta, sum Føroya Gjaldstova hevur í BankNordik til at rinda fyri okkara Eurocard við.

Konta 0438: soleiðis eitur "kassi" í "Kontuskipan landsins". Útgreining av kontu 0438 sigur okkum, hvør spesifikkur kassi, ið talan er um. T.d. merkir 0438-4700: kassi, sum Føroya Gjaldstova hevur til smærri innkeyp.

Konta 0649: verður brúkt, tá ið gjaldføri verður flutt millum landskassan og stovnin – bæði kassaáfylling og kassatøming. Eins og við kontu 0643-1300, so síggja vit, at henda konta verður debeterað í uppgerð fyri tann "kassa", sum rindar pening út – og krediterað í uppgerð fyri tann "kassa", sum móttekur pening.

Kontur 0649-1000 og 0649-1100, sum eru settar upp til sjálvvirkandi tømingar mótvegis landskassanum, hava somu funku sum 0649-0000.

Konta 0643-1000: stovnar, sum hava PBS-terminal knýttan at kassanum, brúka hesa kontu. Saldan á hesi kontu skal svara til tað, sum enn ikki er komið inn í bankan. "Kassabeholdningur", tá ið stovnur hevur PBS-terminal, er: taldur peningur pr ávíst tíðspunkt + tað, sum er í PBS-terminalinum pr sama tíðspunkt. Her skal saldan ongantíð vera "kredit". Saldan er dagliga debet, til peningur kemur í bankan, og kontan verður krediterað í uppgerð fyri bankan.

Konta 0643-1300: stovnar, sum hava bæði kassa og banka nýta hesa kontu at flyta peningin millum kontur við. Henda konta varð stovnað, tí at stovnar annars brúktu kontu 0649 bæði til kassaflytingar millum

landskassan og stovnin – og í stovninum innanhýsis. Tann, sum stemmaði 0649 av, skuldi tí fyrihalda seg bæði til “stemmar tað ikki innanhýsis á stovninum” og “stemmar tað ikki millum stovn og landskassa”.

Hesar kontan hevur eisini serligan týdning, tí at skipanin við postávísingum er burtur, og tí verður kassaáfylling gjørd á eina bankakontu – stovnurin tekur síðani út sjálvur “til kassan”.

--

Henda konta verður debeterað í uppgerð fyri tann “kassa”, sum rindar pening út – og krediterað í uppgerð fyri tann “kassa”, sum móttekur pening. Vit síggja beinanveg, at “debet millumrokning” merkir “kredit (minkandi) kassasalda” – og “kredit millumrokning” merkir “debet (vaksandi) kassasalda”.